## Krabbi økir ikki abortvanda

Nýggj kanning frá Kræftens Bekæmpelse vísir, at kvinnur, ið hava fingið viðgerð fyri krabbamein, ikki nýtast óttast at missa fostrið, um tær gerast við barn. Lækni og granskari, Jeanette Falck Winther, sigur, at kvinnur, ið hava fingið viðgerð fyri krabba, saktans kunnu fáa frísk og sunn børn. Og vandin fyri at missa fostrið er ikki hækkaður, hóast krabbaviðgerðina. Hon sigur, at nógvar kvinnur óttast at fáa børn eftir krabbaviðgerð, tí tær halda, at tað skaðar barnið. Og hóast skaði kann koma á bæði egg og sáðkyknur av stráluviðgerð, so verður skaðin ikki førdur víðari í arvarøðini, slær granskarin fast.

## Heilsu-frøðiligi sáttmálin á gáttuni

**Forðingarnar við føroyskum útflutningi av heilivági og fiskafóðri til Noregs tykjast verða loystar**



*Jørgen Niclasen fegnast um gongdina*

Á fundi í Oslo við Jørgen Niclasen, landsstýrismann í uttanlandsmálum, lovaðu norðmenn, at heilsufrøðiligu trupulleikarnir verða loystir stutt eftir ársskiftið

Jørgen Niclasen fegnast um gongdina í málinum.

Hann staðfestir, at vit hava verið í samskifti við Noreg í fleiri ár um trupulleikarnar í sambandi við okkara útflutning. Og loksins røkist fyri, at formligi heilsufrøðiligi sáttmálin við Noregs er við at koma undir land.

- Hetta hevur serligan týdning fyri føroyskan útflutning av heilivági og fiskafóðri til Noregs, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanlandsmálum.

Á fundum í Oslo fríggjadagin við Jonas Gahr Støre, uttanríkisráðharra, og Heidi Grande Røys, norðurlendskansamstarvsráðharra, hevur Jørgen Niclasen viðgjørt norðurlendskt samstarv, føroyskan EFTA limaskap og handilsviðurskifti landanna millum.

-áki-

# Ársins Rósa í Leirvík við sjáldsamum lyndi

**Leirvíkingar hava valt sína ársins rósu og tað er ein útlendsk kvinna, sum hevur sett síni spor eftir seg í bygdini**

ÁRSINS RÓSA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Monica Stauss Joensen ríkað Leirvík við sínum tónleiki og sínum offurvilja og fyri tað hevur hon nú fingið heiðurin sum ársins rósa í Leirvík. Her stendur hon vinstrumegin við heiðursbrævinum, saman við borgarstjóranum, Fríðgerð Heinesen, sum heldur blómutyssinum*

Ársins rósa í Leirvík eitur Moniku Stauss Joensen.

Tað er greitt, eftir at navnið á ársins leirvíkingi varð avdúkað seinnapartin leygardagin, táið jólaskipið hevði lagt at í bygdini í allarfagrasta veðri.

Hesuferð vóru fólk biðin um at koma við uppskoti til Ársins Rósu og síðan hava Leirvíkingar valt Moniku Stauss Joensen sum Ársins Rósu 2008.

Sera nógv fólk var á bryggjuni og tóku í móti jólaskipinum og ikki minst, jólamonnunum í Leirvík fríggjadagin.

Tá ið skipið var farið avstað aftur, sang Bárður á Lakjuni nakrar jólasangir og síðan handaði Frígerð Heinesen, borgarstjóri, Moniku Ársins Rósu 2008.

Orsøkin til, at Monika Stauss Joensen hevur fingið hendan heiðurin, er, at hon hevur ríkað Leirvík við tónleiki og offurvilja til hin einstaka.

Tey siga, at hon hevur eini sjáldsom evni at síggja, hvør hevur brúk fyri ugga ella nøkrum vinarligum orðum, tá ið á stendur.

- Hon bakar og pakkar gávur og skrivar vinarligar heilsanir. Ársins Rósa kemur úr fremmandum landi, og er tað sjáldsamt at síggja hennara vinarliga og tolsama lyndi, siga tey í grundgevingunum

# Sundafólk fingið vinir í Noreg



*Fólk í Sunda Kommunu fara næsta ár til Noregs at vitja nýggja vinarbýin og væntandi fáa tey eisini vitjan aftur*

**Sunda Kommuna og Rissa Kommuna í Noregi, eru blivnar vinakommunur og næsta ár fara tey at vitja hvønn annan**

VINABÝIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sundafólk hava nú fingið nýggjar vinir.

Tað er hent, eftir at Sunda kommunu hevur gjørt sáttmála um vinabýarsamstarv við Rissa kommunu í Noregi.

Rissa er beint við Tróndheim og har búgva góð 6000 fólk.

Umboð fyri Rissa Kommunu vóru í Sundalagnum herfyri og gjørdu vinabýarsáttmálan og bæði kommunustýrini hava nú góðkent vinabýarsáttmálan.

Sostatt er ætlanin, at samstarvið ímillum báðar kommunurnar skal byrja næsta ár. Hugsað verður bæði um at kommunustýrini hittast av og á, men eisini um at bólkar úr teimum báðum kommununum kunnu vitja hvønn annan.

- Eitt tað fyrsta, vit hugsa um, er at kanna eftir, hvussu tey í Rissa Kommunu hava skipað seg við skúlaskapi, barnaansing og øðrum slíkum stovnum, sigur Heðin Zacariassen, borgarstjóri í Sunda Kommunu.

Hann sigur, at ætlandi fara umboð fyri Sunda



*Smyril fekk ikki siglt sunnudagin fyri veðri og mátti leggja tveir túrar burtur ímillum*

# Smyril slapp ikki frá bryggju

**Smyril slapp ikki frá bryggju í Havn í morgun**

Tey havnarfólk, sum eru á fótum sunnumorgunin, hava óivað varnast, at strandfaraskipið Smyril, liggur enn við bryggju í Havn, hóast hann átti at verið farin til Suðuroyar klokkan 9.30.

Orsøkin til tað er, at tað er so nógvur vindur í Havn í morgun, at hann slapp ikki frá bryggju sunnumorgunin.

Havnarskrivstovan sigur, at hann var 15-28 metrar um sekundið og tá ið ættin harafturat er útsynningur og sostatt liggur beint inn á molan, var vónleyst at sleppa frá bryggju.

Men út á dagin hækkaði hann og um kvøldið blivu betri líkindi

Á miðdegi tók so Strandferðslan avgerð um at Smyrli sigldi ikki aftur fyrrenn eftir galdandi ferðaætlan av Havnini klokkan 20 sunnukvøldið.

Sostatt varð túrurin klokkan 17.30 av Krambatanga heldur ikki sigldur.

-áki-